## Føroyska ferðavinnan skal betrast

Í dag verður skipað fyri Ferðavinnudegi, sum er fyri øll tey, sum virka í hesi vinnuni. Dagurin settur klokkan 13 á Hotel Føroyum. Føroya Tele, Samvit, Atlantic Airways og íslendska felagið SAF halda fyrilestrar. Ætlanin er at seta føroyskt ferðavinnufelag á stovn og hetta verður gjørt seinnapartin í dag. Ætlanin við Ferðavinnudagnum er at menna føroysku møguleikarnar. Evnini verða vørumenning, branding, ferðavinnufelgaið og íblástur úr Íslandi.

## Dátueftirlitið á eftirlitsvitjan

Dátueftirlitið hevur í døgunum 29. og 30. oktober verið á eftirlitsvitjan hjá átta almennum og privatum stovnum og fyritøkum í miðstaðarøkinum. Eftirlitið varð gjørt hjá fimm privatum fyritøkum, tveimum almennum stovnum og einum aðalráð. Í 2008 var játtanin hjá Dátueftirlitinum hækkað, so tað er vorðið gjørligt at røkja hendan partin av arbeiðinum, nevniliga at fara út á eftirlit við tekniskum serfrøðingum. Hetta er ein uppgáva, sum ikki hevur verið røkt seinastu fýra árini. Sum liður í virkseminum hjá Dátueftirlitinum frameftir er ætlanin regluliga at gera fleiri árligar eftirlitsvitjanir. Næsta eftirlitsvitjan verður eftir ætlan primo 2009, sigur Dátueftirlitið í tíðindaskrivi.

# Kundi blivið professionellur

**Kenneth Danielsen koyrir motorcross á semi-professionellum støði í Danmark. Hann byrjaði at koyra sum 10 ára gamal, og væntar at hann hevði møguliga verið við í Evropameistaraskapinum, hevði hann veruliga viljað tá á stóð**

PERSÓNSLÝSING
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

- Hevði eg veruliga viljað, so hevði eg nokk kunnað koyrt evropameistaraskap í dag. Venjingin fór við nógvari tíð, tá eg stóð meg best, men eg vildi ikki ofra alla mína tíð uppá tað, sigur 24 ára gamli Kenneth Danielsen, sum verður at hoyra á almennum fundi, sum Føroya MC skipar fyri sunnudagin.

Upprunaliga er hann úr Norðagøtu, men flutti sum seks ára gamal til Danmarkar. Áhugin fyri motorítrótti kom, tá hann sum tíggju ára gamal, hitti ein vinmann í frítíðarskúlanum, sum koyrdi.

- Eg koyrdi nógv á súkklu sum lítil, so tað er ikki so undarligt, at eg beinavegin fekk áhuga, tá eg royndi at koyra við motori, greiðir hann frá.

Hóast 10 ár tykist sum ein ungur aldur til at fáast við motorsúkklur, byrja summi longu sum tvey ára gomul. Áhugin fyri hesari ítrótt vaks so við og við, men sum 16 ára gamal gavst hann. Harða og nógva venjingin fór við ov nógvari tíð, so hann valdi frítíð og vinir framum.

- Tvey ár seinni innsá eg at tað var mítt stórsta mistak, sigur hann syrgin. Av fíggjarligum áðum mátti hann bíða til hann var 22 ár við at byrja aftur.

### Semi-professionellur

Í dag koyrir hann á semi-professionellum støði og stendur seg væl. Hann hevur vónir um at koma við til Danmarksmeistaraskapið. Tá hann byrjaði aftur, mátti hann niður á byrjunarstøði aftur, úr bólki A niður í C, men uttan trupulleikar er hann longu komin upp í B, sum kallast 250-500 kubikk.

Vónirnar um at sleppa í kappingar uttanlands hevur hann slept. Hann metir seg vera ov gamlan til tað nú. Teir bestu koyrararnir eru heilt ungir og venja miðvíst. Sjálvur nýtir hann 15 tímar um vikuna uppá ítróttina. Hetta umfatar koyring og viðlíkahald av útgerðini.

### Besta upplivingin

Spurdur um hvør tann besta upplivingin hann hevur havt í samband við kappkoyring, ivaðist hann ikki í at greiða frá Sjællands meistaraskapinum.

- Eg datt í fyrstu sneiðingini, og fall aftur á eitt 26. pláss, men endaði sum nummar tvey 20 minuttir seinni. Tveir teir seinastu umgangirnar yvirhálaði eg átta aðrar.

Um hetta mundið fór hvør tann einasti dagur við konditións- og styrkivenjing. Hetta gjørdist ov nógv fyri hann, og tað var tá hann gavst. Hann var 16 ár og lá til at vinna meistaraskapið, ið hevði tvær av fimm koyringum eftir.

Hann metir, at hevði hann hildið á við somu ferð, so hevði hann uttan iva kunnað koyrt á einum altjóða støði í dag. Kanska luttikið í Evropameistaraskapinum.



*Kenneth Danielsen koyrir motorcross á høgum støði niðri. Sunnudagin verður hann við á kunnandi fundi hjá Føroya MC.*
*Savnsmynd*

## Semi-professionellur føroyingur heldur fund

Sunnudagin 2. novembur klokkan 15 verður skipað fyri almennum fundi í Tekniska Skúla í Havn. Á fundinum luttekur Kenneth Danielsen, ið er semi-professionellur kappkoyrari. Endamálið við fundinum er, at kunna áhugaðar koyrarar um møguleikarnar at gerast professionellur ella semi-professionellur. Fundurin er eisini fyri foreldur, ið ynskja at vita meira um hesa ítrótt. Til hesa kunning verður høvi at spyrja pápa Kenneth Davidsen viðkomandi spurningar. Kappkoyringarsúkklur verða eisini sýndar fram á staðnum. Umboð frá Føroya-MC hava sínar súkklur og Kenneth Davidsen sína. Verður veðrið til vildar verður høvi at síggja nakað av koyring á staðnum, skrivar heimasíðan hjá Føroya MC.

# Skipa bensin í blóðinum

**Í felagnum Føroya MC samlast føroyingar við bensini í blóðinum til kappingar og fundir av ymsum slagi. Hundrað limir eru í dag í felagnum og fleiri luttaka í kappingunum, ið verða hildnar til tíðir**

FELAG
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Fyrst av øllum var felagið stovnað, við tí endamáli at samla motoráhugaðar føroyingar, greiðir Sofus Jacobsen, næstformaður frá. Tað hevur eisini verið at hoyrt fyrr, at um tey, sum hava »bensin í blóðnum« fáa høvi at blása tað út, halda tey seg frá alfaravegi. Og á tann hátt virkar eitt slíkt felag fyri ferðslutrygdini.

»Road-racing« er kappkoyring á vegi. Hann greiðir frá, at felagið plagar at leiga p-økið hjá Føroya Tele, ella okkurt havnaøki frá onkrari kommunu. Alt kann nýtast, bert um har er nóg mikið av plássi. Áhugi er fyri hesum í Føroyum, men størst undirtøka er innan motorcross.

Har vóru ikki nógvir limir í felagnum í byrjanini, men síðan virksemið er byrjað at umfata motorcross og ATV-koyring er limatalið vaksið nógv. Kappingar í hesum báðum verða hildnar í haganum, á sokallaðum »off-road« banum.

Halda framgongdini

Tess størri undirtøka, tess størri krøv. Limatalið er í dag um hundrað, men hevur tó verið yvir 300. Sofus Jacobsen metir orsøkina til minkingina vera, at nú eru fleiri onnur mc-feløg kring landið.

Frá at møtast undir heilt vanligum umstøðum, eru kappingarnar nú nógv betri fyriskipaðar. Í ár var álagt luttakarunum at melda seg til í góðari tíð, gjalda fyri luttøku og høvdu neyðugu trygdarútgerðina, ið umfatar meir enn einans hjálm og hanskar.

Tá kappingarnar verða hildnar, luttaka vanliga umleið tólv í road-racing og eini 10 í off-road kappingunum. Eisini verður skipað fyri ATV-junior kappingum, ið eru til børn undir 14 ár, her luttaka umleið trý, greiðir hann frá.

### FAKTA

Føroya MC varð stovnað í 2002, var tá einasta mc-felag í Føroyum.

Í løtuni teljast 100 limir í felagnum, men talið hevur verið yvir 300.

Byrjaði við Road-racing, men fevnir nú eisini um motorcross og ATV koyring.

Hava skipað fyri nógvum kappingum.